gult12 cyan12 magenta12 svart12

Almanna- og Heilsumálastýrið
Starvsfólkadeildin

Vegna ov tláar umsóknir verour starvio lyst leyst av nyggjum

Almanna- og heilsumálastýrið søkir starvsfólk til barnaansingarøkið

Í sambandi vio at nyggj dagstovnalóg varo sett í gildio tann 1. juli 2000, verour vio hesum søkt eftir einum fólki at taka sær av yvirskipaca eftirlitinum, og ráogeva kommunum, io umsita dagstovnar og dagrøktir sambeert dagstovnalógina. Starvio verour at seta 1. september 2001 ella eftir nærri avtalu.

Arbeiosuppgávurnar eru í høvuosheitum:
- at áseta reglur og hava eftirlit vio, at kommununar umsita lógina um dagstovnar og dagrøktir sambeert nyggju dagstovnalógini
- at veita kommununum ráogeving og vegleioing í øllum umsitingarligum fyriskipanunum, io verca ásettar.
- at veita kommununum fakliga ráogeving.

Førleikakrøv:
- námsfrøoiliga- ella líknandi útbúgving
- umsitingarligar royndir
- kunnleika til EDV
- evni at samstarva og samskipa.
- vitan um tær treytir sum eru galdandi í einari politiskari fyrisiting

Vio bjóoa:
- Sjálvstøougt starv vio fjølbroyttum uppgávum sum til túcir er strævio, men eisini áhugavert
- Flex-tío
- Skeio- og eftirútbúgvingarmøguleikar.

Løn- og setanartreytir:
- starvio hevur tilvísing til deildarstjóran á Fyrisitingardeildini
- starvio skal setast skjótast tilber
- løn sambært avvtalu í mill um Fíggjarmálastyrio og viokomandi yrkisfelag
- setanarøkio er Almanna- og heilsumálastyrio vio tilhoyrandi stovnum, umframt hini aoalstyrini og Løgmannsskrivstovuna.

Meira fæst at vita um starvio vio at venda sær til Súsonnu Nolsøe, fulltrúa á tlf. 304050.

Umsókn:
Umsókn saman vio viomælum, upplysingum um útbúgving og royndir skulu vera Almanna- og heilsumálastyrinum í hendi **í seinasta lagi 18. juni 2001 kl. 14.00** og skal sendast til:

Almanna- og heilsumálastyrio
Starvsfólkadeildin
Eirargarour 2
100 Tórshavn

Nýggj sól í Kollafirði

Kom og royn tað nýggjasta innan sólir í Føroyum

opnar leygardagin kl. 13.00

Sólirnar hjá Majbritt
Tlf. 421591

Heimsins mestbeti talvari til Føroyar

Fremed talvari í heimum eitsamu tíman sínu, Garri Kasparov, verður í Føroyum í dagunum 8.-12. juni í ár.
Talvsambandi Faroya hevur boðið til ruskiku talvkjakinni heim á tláttanar í summar. Meira tarvbeiðilsja tilmæli á Føroyatíðindi verður heldur ávirkin í Norðurlandshúsinum millum fyrsta og landsliðið og Kasparov. Tá verður skipað so, at heimsins besti talvari skal koppast móti seks beimum bestu talvarir Føroysku talvmannunum í sam.
Hetta verður símultanstevning, Kasparov fer at gangra í millum teg seks borðini og hevur til einkstakar ávirkir móti hvørjum av talvmonnum seks Føroyskur landsliðsfólkum.
Im 66 mun verði dokkari talvarum hevur Kasparov verið nú-diligur við yvirtøkur. Kongurin vitjar Faroyar og nógur lítil, eyarningurin er, meginarvirkt at sveiva aftur? Fylg við í Norðurlandshúsinum, sunnudagin 10. juni kl. 14.00.
Argangumarkur til landsliðsins fáast til kaups í Norðurlandshúsinum.



gult13 cyan13 magenta13 svart13

ítróttur

Nr. 104 • leygardagur • 2 juni 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

- Sjálvandi eru vit favorittar, men vit hava sera stóra virðing fyri teimum úrslitum, sum føroyska landsliðið hevur fingið seinnu árini.

Arbeiðið skal gerast

Hóast hann í ár hevur vunnið tríggjar stórar steypasigrar, so er 26 ára gamli Stephane Henchoz ikki bangin um at taka ov lætt upp á komandi uppgávuna

LANDSDYSTUR
Jákup Mørk

Hóast ferðalagið við sveisiska landsliðnum var nakað seinkað hósdagin, so komu bæði leikarar, venjarar og tíðindafólk fram í øllum. Eftir at hava fingið sær eitt lítið ábit á Hotel Føroyum, skuldi vøddarnir mýkjast nakað, og í hálvan annan tíma vandu mótstøðumenninir hjá Føroyum so á Tórsvølli.

Sum tíðindamaður er talan í slíkum førum ofta um langa bíðitíð, og í so máta var hendan venjingin einki undantak. Bíðitíðin tóktist tó at vera til fánýtis fyri okkara viðkomandi, tí beint eftir lokna venjing hildu at kalla allir leikararnir beina kós móti bussinum, sum skuldi føra teir niðan aftur á hotellið. Ein sveisisk radiostøð fekk okkurt orðið á ein av leikarunum, men annars tóktust teir ikki at vísa fjølmiðlunum serliga ans.

Við góðari hjálp frá einum sveisiskum tíðindamanni, eydnaðist okkum tó at fáa ein av best kendu sveisarunum út úr aftur bussinum, og tá alt kom til alt, so tóktist Stephane Henchoz ikki á nakran hátt at vera serliga stórlætin. Heldur ikki hóast hann longu nú hevur vunnið ein stóran part av tí, sum vinnast kann í fótbólti.

Við enska felagið sínum, Liverpool, hevur hann í ár verið partur av søguskriving í fótbóltshøpi. Liðið hevur verið í trimum steypafinalum, og hevur vunnið hesar tríggjar, og hetta hevur einki enskt lið megnað áður.

Eingin løtt uppgáva

Ein skuldi tí kanska hildið, at ein landsdystur móti eini pinkutjóð norðarliga í Atlantshavinum ikki var nakað, sum ein slíkur spælari sá fram til, men hetta tóktist als ikki at nerva tann sera fyrikomandi Stephane Henchoz.

- Sjálvandi hevur tú rætt í, at hetta er øðrvísi enn eitt nú FA Cup finalan. Atmosferan kann ongantíð verða hin sama, men hetta ger tó ikki, at eg ella liðfelagarnir taka lætt upp á uppgávuna. Hóast eg havi vunnið trý steyp við Liverpool, so er hetta nakað heilt annað, og málið hjá landsliðnum er at koma til HM-endaspælið. Skulu vit tað, so krevur tað helst trý stig her, og hetta verður eisini setningurin hjá okkum.

Hetta ljóðar jú sum ein ógvuliga fábroytt standardútsøgn frá einum yrkisleikara, men hóast vit royndu at orða hetta enn einaferð, so tóktist verjuleikarin ikki at vika í hesum. Heldur ikki hóast Sveis longu hevur vunnið 5-1 á okkara monnum.

- Sjálvandi eru vit favorittar, men vit hava sera stóra virðing fyri teimum úrslitum, sum føroyska landsliðið hevur fingið seinnu árini, so talan verður ikki á nakran hátt um ein lættan dyst fyri okkara viðkomandi.

- Sum eg segði, so hava vit eina uppgávu at loysa her, og eg eri ikki í iva um, at skal hendan loysast, so krevur tað eitt gott avrik frá okkum. Tað er so eisini tað, sum vit ætla at gera. Vit verða noyddir at spæla ein góðan dyst, har vit ikki kunnu loyva okkum at taka nakað fyri givið, sigur fryntliga Liverpool-stjørnan at enda.

Julian spælir upp á lænta tíð

Stríðsmaðurin úr Sogndal kennir seg at vera væl fyri, men hann hevur fingið at vita, at vandin er stórur fyri, at liðbondini í fótliðnum dragna uppaftur meiri

LANDSDYSTUR
Jóannes Hansen

Tað hevur ikki verið so nógv at hoyr til hansara síðstu tíðina, men undir venjinginii á Svangaskarði í fyrradagin og í gjár tóktist hann at vera væl fyri. Tað er Julian Johnsson, sum vit tosa um. Stríðsmaðurin, sum plagar at tuska og renna uppaftur meiri enn allir hinir á landsliðnum.

Í vár hevur hann havt trupulleikar við beininum. Hetta hevur havt við sær, at hann ikki hevur spælt í tippuliguni í meiri enn ein mánað. Men nú er hann tøkur aftur. Undan heimferðini til Føroya hevur hann spælt ein dyst á 2. liði hjá Sogndal, og hann sigur seg ikki kenna nakað til skaðan.

– Eg havi fingið at vita, at liðbondini í fótliðnum ikki hava tað heilt gott. Um hesin veikleikin skal hvørva, so skal eg binda frið í fleiri mánaðir, ella kanska verður tað neyðugt við skurðviðgerð. Tað ber væl til at venja, soleiðis sum støðan er, og tað havi eg valt at gera. Um skaðin versnar, og tað ikki fer at bera til at spæla, so má tað fáa tær avleiðingarnar, sum eru neyðugar, men fyribils spæli eg við fullari ferð, sigur Julian Johnsson.

- Um hesin veikleikin skal hvørva, so skal eg binda frið í fleiri mánaðir, ella kanska verður tað neyðugt við skurðviðgerð
Mynd: Jens Kr. Vang

Óli skuldi spæla mikudag og hósdag

Í Hvidovre var ætlanin, at Óli Johannesen skuldi spæla við teimum komandi hósdag, sum er dagin eftir dystin ímóti Jugoslavia

LANDSDYSTUR
Jóannes Hansen

Síðani hann seinast var í Føroyum og spældi landsdyst, er Óli Johannesen fluttur úr einum felag í superliguni og til eitt felag í næstbestu donsku deildini. Men eingin ivi kann vera um, at aftasti verjuskansin, sum fyri tveimum mánum síðani í Moskva spældi fyri 50. ferð á landsliðnum, er betri fyri enn nakrantíð.

Í AGF var hann síðstu tíðina fyri tað mesta á beinkinum, meðan hann í Hvidovre er í miðverjuni hvørja ferð. Venjingarstøðan er eisini góð, tí í Hvidovre venja teir sjey ferðir um vikuna.

– Viðurskiftini í felagnum eru á allan hátt sera professionell, og eg trívist stak væl. At Frank Skytte er venjari var mær til fyrimunar, tá eg í fyrstu tíðini eftir skiftið úr AGF og til Hvidovre skuldi stríðast fyri at koma á liðið, heldur Óli.

Frank Skytte hevur verið venjari hjá TB. Fyri stuttum hevur hann longt samstarvsavtaluna við Hvidovre inntil komandi summar. Hvidovre skal spæla á Tórsvølli ólavsøkuaftan. Og sambært Óla Johannesen, so er venjarin framvegis áhugaður í Føroyum og føroyskum fótbólti. Hetta sæst m. a. í, at hann er væl kunnaður um gongdina í bestu deildini í Føroyum.

Óli Johannesen var liðformaður á landsliðnum í Moskva. Hesa ferð eru hvørki Jens Kristian Hansen ella Todi Jónsson við, og tí kann roknast við, at Óli aftur fer at vera høvuðsálitið á vøllinum.

At Hvidovre eisini hevur stórt álit á Óla Johannesen sæst aftur í, at teir ætlaðu at fáa hann at spæla við teimum dagin eftir, at landsliðið komandi mikudag hevur spælt ímóti Jugoslavia.

Í Danmark eru reglurnar soleiðis, at eitt felag hevur loyvi at biðja um at fáa landskappingardyst fluttan, um tveir spælarar á liðnum eru uppticknir av landsdystum. Í síðstu viku var Stefan Andersen, sum er málverji hjá Hvidovre, úttikin til danska U–21 landsliðið. Tá Óli Johannesen frammanundan var úttikin til føroyska landsliðið, bóðu teir í Hvidovre um, at landskappigardysturin hjá teimum 2. hvítusunnudag varð fluttur, men grundarlagið undir áheitanini datt burtur síðsta vikuskifti:

– Tá fekk eg gula kortið, og tað hevði leikbann við sær. Tí var tað bara málverjin, sum ikki kundi vera við 2. hvítusunnudag, og harvið verður tað ikki neyðugt hjá mær at spæla bæði mikudagin og hósdagin, greiðir Óli Johannesen frá.